# Tjaldingin á G! útseld

Fyrireikarnir fyri G! Festivalin boða frá, at tjaldingin til ársins festival er útseld áðrenn festivalbyrjan. Hetta hóast kapasiteturin er meira enn tvífaldaður.

Tað merkir at fleiri enn 500 tjalda á tjaldingarøkinum við Gøtugjógv. Í vikuskiftinum avgjørdu fyrireikararnir at loyva 100 fólkum inn afturat. Hetta var alt selt í sunnukvøldið.

**nud**



# Laksa- og Sølutorg í Runavík

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 23. juli verður árliga Laksa- og Sølutorgið í Runavík hildið. Handlarnir í Handilsmiðdeplinum í Runavík hava langan leygardag hendan dagin, opið verður til kl. 17.00.

Møguleiki verður at royna ein góðan ókeypis bita av laksi. Kokkar úr matstovuni Casa Blanca eru á staðnum og veita góð ráð.

Á marknaðinum kanst tú keypa ferskan fisk, blómur, klæðir, brúktar leikur, lopputing og nógv annað.

Harumframt verður køkutombola, kafé og fiskibrunnur.

Á pallinum verða ymisk tiltøk frá G! Festival, sum er hetta sama vikuskiftið. Tiltøkini byrja kl. 11 við ungum fólkatónleikarum úr Hetlandi og Føroyum. Kl. 12 verður eitt tiltak fyri børn, kl. 13.00 Fólkatónleikur við Nadin úr Irak og kl. 14.00 Fólkatónleikaratrioin Færd úr Danmark og Svøríki.



# Listaframsýning í Gamla Handlinum hjá Olivar

Tíðindaskriv

Í sambandi við Laksa- og sølutorgið í miðbýnum í Runavík komandi leygardag, verður listaframsýning við málningum hjá Gunnvá Justinussen í Gamla Handlinum hjá Olivar.

Gunnvá hevur málað síðan hon var barn, men seinastu árini hevur hon gjørt meira við tað enn áður. Hon málar akryl og akvarell málningar. Flest allir málningarnir ímynda landsløg og hús, men tó eru nakrar hugflogsmyndir inn ímillum.

Øll eru vælkomin inn á gólvið í hugnaliga Gamla Handlinum hjá Olivar.

Listaframsýningin er opin leygardagin 23. juli frá kl. 11 - 15.

# Einans 1000 atgongumerki eftir til G!

Í gjár varð tjaldingin til G! Festivalin útseld, og fyrireikararnir vænta, at atgongumerkini til sjálvan festivalin verða útseld í vikuni. Longu nú eru 4.000 fólk við atgongd báðar dagarnar, hetta er tó við starvsfólki og tónleikarum íroknaðum.

Festivalurin loyvir sostatt bara 1000 gestum afturat hvønn dagin við vikuskiftis og einsdagsatgongumerkjum íroknaðum.

Forsølan slær øll met í ár og er hópin størri enn í fjør, sum aftur var hópin betri enn árið fyri. Tað tykist sum um føroyingar eru farnir at keypa í forsølu, hetta hevur ikki verið serliga vanligt fyrr. Báðir teir stóru festivalarnir njóta gott av hesum.

Sølan av atgongumerkjum til G! á alnetinum er latin aftur fyri hesuferð. Men enn fáast atgongumerki á Shellstøðum, Kunningarstovum og Posthúsum.

**nud**





Skrivstovubygningur
á Argjavegi 26, Argir til sølu

Sosialurin 341800

Bygningurin er í 3 hæddum á uml. 200 fermetrar hvør. Grundøkið er 689 fermetrar. Bygningurin er innrættur sum skrivstovuhølir í teimum ovastu hæddunum og eitt stórt rúm í niðastu hæddini.

Bygningurin er væl egnaður til nógv ymisk endamál og hevur góð parkeringsviðurskifti.

Bygningurin verður seldur um hóskandi boð fæst.

inni

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510



ICELANDIC FISHERIES EXHIBITION
7.-10. september 2005

Flogfelag Føroya skipar fyri ferð í samband við ICELANDIC FISHERIES EXHIBITION. Farið verður úr Føroyum mikudagin 7. september kl 07:45 og úr Reykjavík leygardagin 10. september kl. 17:30.

Kostnaður fyri hvønn:

| | | |
|---|---|---|
| Nordica Hotel | einkultkamar | kr. 8.920.- |
| Nordica Hotel | dupultkamar | kr. 7.060.- |
| Sjómansheimið Ørkin | einkultkamar | kr. 7.280.- |
| Sjómansheimið Ørkin | dupultkamar | kr. 6.430.- |

Kostnaðurin er íroknað flogferð, ferðagjøld, innivist við morgunmati, transfer til og frá innivistini við komu og fráferð, eisini fer bussur frá hotellunum til messuøkið um morgunin 8. og 9. september.

Bílegging innan 15. august 2005 á marita@ff.fo ella tel. 340000

FLOGFELAG FØROYA

www.flogfelag.fo